LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 30. mai 2025
J. nr.: 25/13191-2

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-103/2024 eftir § 52 a í Tingskipanini frá Beinir Johannesen, løgtingsmanni, um treytir til útlendska arbeiðsmegi

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hevur landsstýrismaðurin umrøtt møguleikan at seta treytir viðvíkjandi revsiváttan og samfylgjandi familju til útlendska arbeiðsmegi?

2. Um ja, nær kann væntast, at hesar treytir verða settar?

Svar:

Til spurning nr. 1

Møguleikin fyri at seta treytir viðvíkjandi revsiváttan frá útlendskari arbeiðsmegi er m.a. umrøddur við Útlendingastovuna, sum mælir til, at tað verða arbeiðsgevarar, sum skulu krevja revsiváttanir frá sínum útlendsku arbeiðstakarum. Um Útlendingastovan skal krevja revsiváttanir sum partur av málsviðgerðini at lata arbeiðs- og uppihaldsloyvir, fer tað at seinka málsviðgerðini hjá Útlendingastovuni alt ov nógv, tí revsiváttanirnar skulu tá váttast hjá viðkomandi útlendsku myndugleikum.

Av tí at útlendingamál er felags málsøki, hevur Løgmálaráðið eisini umrøtt spurningin við Udlændinge- og Integrationsministeriet. Udlændinge- og Integrationsministeriet hevur boðað frá, at tey ikki meta tað vera í stríð við ásetingarnar í føroysku útlendingalógini, at tað verður ásett í løgtingslóg, at arbeiðsgevarar skulu krevja revsiváttan frá útlendskum arbeiðstakarum í sambandi við umsókn um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum.

Viðvíkjandi treytum til samfylgjandi familju setti landsstýrið í september 2023 inntøkukrøv í sambandi við, at útlendskir arbeiðstakarar taka familju sína við sær til Føroyar.

Viðvíkjandi øðrum krøvum til samfylgjandi familju, so sum at ein ávís tíð skal ganga, áðrenn samfylgjandi familja kann fá uppihaldsloyvi í Føroyum, at samfylgjandi familja skal hava ávísan málkunnleika og at samfylgjandi makin skal hava arbeiðsloyvi, um hann skal arbeiða í Føroyum, eru hetta treytir, sum arbeitt verður við í løtuni í sambandi við arbeiðið at gera nýggja útlendingalóg fyri Føroyar.

Til spurning nr. 2

Ætlanin er at fara í gongd aftaná summarfrítíðina við at gera uppskot til løgtingslóg við krøvum til arbeiðsgevarar, sum seta útlendingar í starv, so sum at arbeiðsgevarar skulu krevja revsiváttan frá útlendskum arbeiðstakarum, at teir skulu tryggja, at útlendingarnir hava sínar tryggingar í lagi og at teir hava ávísar málkunnleikar, tá teir søkja um arbeiðs- og uppihaldsloyvi í Føroyum.

Arbeiðið við at gera nýggja útlendingalóg fyri Føroyar er í gongd og verður væntandi liðugt komandi summar.

Løgmálaráðið, tann 30. mai 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður